# Frá donskum forskúla út á bygd



*Saman við Peter pakkaðu Sára og Sára gávur upp, sum útibarnagarðurin fekk. Og spenningurin var stórur at vita, hvat var í*

**Fyrst í hesum árinum lat ein útibarnagarður upp í Haraldssundi. Ein útibarnagarður, sum hoyrir undir dagstovnin Mylnuhúsið í Klaksvík. Har ganga 20 børn og eitt av teimum er sjey ára gamla Sára, sum er komin úr Keypmannahavn út á bygd í útibarnagarð**

BARNAANSING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Haraldssund:**
Ein av gentunum, sum gongur í útibarnagarðinum, er sjey ára gamla Sára. Hon hevur júst fylt sjey og skal í skúla í summar.

Hon og familja hennara flutti til Klaksvíkar at búgva í fjør eftir at hava búð í Keypmannahavn í nógv ár. Sostatt er Sára komin úr forskúla í einum stórbýi út á bygd at ganga í útibarnagarð. Hon sigur, at henni dámar øgiliga væl, og tað liggur eisini væl fyri hjá henni at tosa føroyskt.

Pápi hennara, Edvard, sigur, at tey fegnast um hendan møguleikan, sum dóttir teirra hevur fingið.

– Hetta er sjálvandi nakað heilt annað, enn tað hon er von við niðrifrá. Hon er farin frá at forskúla í Danmark til at fanga krabbar í Haraldssundi. Men tað er fínt, og hon trívist væl, sigur hann.

Sára og foreldur hennara búgva í Klaksvík, og tey ivaðust í fyrstuni, um tey skuldu taka av tilboðnum í Haraldssundi.

– Hetta var áðrenn vit funnu útav, at bussurin steðgar á vegnum niðri undir húsunum hjá okkum á veg til Haraldssunds. Tí vit hugsaðu bara um, hvussu vit skuldu kunna fáa hana norður til Haraldssund hvønn dag, tá vit ikki hava bil, greiðir hann frá.

Útibarnagarðurin hoyrir sum sagt undir Mylnuhúsið. Bussur fer frá stovninum um hálvgum tíggju tíðina hvønn morgun norður til Haraldssund, og um børnini mugu møta fyrr enn tað, so eru tey í Mylnuhúsinum inntil tá.

## Góðar umstøður

Børnini, sum ganga í útibarnagarði í bygdini, mugu sigast at hava sera góðar umstøður. Serliga tá havt verður huga, at útibarnagarðar vanliga ikki hava somu umstøður at húsast í sum vanligir barnagarðir.

Útibarnagarðurin húsast í bygdarhúsinum, og har er gott pláss til børnini at reika runt í, tá veðrið ikki er tilvildar at fara út.

Fyri tað mesta halda tey til uppi á loftinum í húsinum, men har er eisini ein stórur salur, har tey eta matpakkarnar, tá tað ikki viðrar til tess úti.

Og hendan dagin tað er opið hús, er dekkað upp inni í salinum til allar gestirnar, sum so kunnu sessast og fáa ein góðan kaffimunn við onkrum søtum afturvið.

Grækarismessudagur er, og tað sást eisini aftur á tí eini køkuni, sum mamma eitt av børnunum hevur bakað. Hon er pyntað við tveimum tjøldrum, og tað er nakað, sum børnini ganga høgt uppí.

## Spæl og gávur

Meðan børnini renna runt og spæla og av og á steðga fyri at fáa sær saft og kaku, stendur streymurin inn av fólki, sum eru komin á vitjan. Fleiri hava gávur við til stovnin, og børnini fegnast um, at tey sleppa at pakka upp. Leikur og bøkur eru í teimum flestu pakkunum. Í onkrum er okkurt spæl, og børnini leggja í vaðið at spæla.

Øll foreldrini eru á einum máli um, at børnini trívast væl í Haraldssundi, og at hetta var eitt avbera gott hugskot at byrja ein útibarnagarð í einari lítlari bygd. Og bygdarfólkið fegnast sum vera man um lívið, sum øll hesi børnini seta í bygdina gjøgnum arbeiðstímarnar á degnum.



*7 ára gamla Sára gekk í forskúla í Keypmannahavn, inntil hon og familja hennara flutti heim í fjør. Og nú rokast hon saman við 20 øðrum børnum í útibarnagarðinum í Haraldssundi, og tað dámar henni væl*



*Rannvá hevði úr at gera hendan dagin í útibarnagarðinum, og hon helt tað vera sera spennandi, at fólk komu at vitja tey*



*Sára dámar eisini væl at ganga í útibarnagarð, og hendan dagin vóru nógvar nýggjar leikur at spæla við*



## UTTAN ÚR HEIMI



*17 fólk eru deyð, og fleiri hundrað hava fingið skaða í samanbrestunum ímillum serbar og albanar í Kosovo.*

*Mynd: Reuters*

# Kann enda við kríggi á Balkan

**Ófriðurin í Kosovo er tann ringasti í fimm ár og kann enda við enn einum kríggi á Balkan**

KOSOVO
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Eftir hampuliga friðarlig viðurskifti í fimm ár eru serbar og albanar í Kosovo aftur brostnir saman. Hesaferð kyknaði ófriðurin í tí sundurbýtta býnum Mitrovica, og í gjár bleiv sagt, at minst 17 fólk høvdu latið lív.

Ófriðurin kyknaði, tí albanar skuldseta serbar fyri at hava rikið tríggjar albanskar smádreingir út í eina á. Tveir av dreingjunum vórðu stutt eftir funnir druknaðir, ein er ikki komin afturíaftur, og tann fjórði svam yvir um ánna. Hann hevur greitt frá, at serbar við hundum róku teir út í ánna.

Friðarvarðveitandi deildirnar, sum hava støð í Mitrovica, royndu at forða fyri samanbrestum, men til fánýtis. Í gjár frættist eisini, at ófriðurin hevði breit seg til fleiri aðrar býir í Kosovo, og at albanar høvdu sett eld á serbiskar bygdir. Í sjálvum Serbia var eisini ófriðarligt. Millum annað varð eldur settur á eina 300 ára gamla mosku í høvuðsstaðnum Brograd.

Ein bretskur herovasti, sum fyrr hevur verið leiðari hjá teimum friðarvarðveitandi deildunum í Kosovo, segði við BBC fyrrakvøldið, at Kosovo er sum ein fløska við brúsandi drykki. Hon skal bara ristast eitt sindur, so rýkur proppurin av, og alt endar í einum roki, segði hann. Tað kann vera tað, sum nú er hent, segði hann.

# Ætlaðu statskvett í Spania

**Tíðindi úr Madrid vilja vera við, at fráfarandi spanski stjórnarleiðarin, Jose Maria Aznar, var til reiðar at skipa fyri statskvetti, tapti flokkur hansara valið**

SPANIA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Amerikanska tíðindastovan AP vil vera við, at ætlanir vóru um statskvett í Spania, um sosialistarnir vunnu valið seinasta sunnudag. Maðurin aftan fyri ætlanina var fráfarandi forsætisráðharrin, Jose María Aznar.

Blaðið El Mundo hevur eisini borið tíðindini. Heimskendi spanski filmsleikstjórin Pedro Almodovar skal sambært blaðnum hava sagt, at hann visti um ætlanina, og blaðið vil eisini vera við, at formaðurin í sosialistaflokkinum, Jose Luís Rodriguez Zapatero, hevði fingið frænir av ætlanini hjá stjórnarflokkinum.

Leiðslan í konservativa flokkinum avsannar tíðindini, og Angel Acebes, innanríkisráðharri, sigur tey vera tað bera tvætl. Flokkurin sigur, at hann umhugsar at stevna Pedro Almodovar.

Sambært El Mundo fóru tíðindini um eitt statskvett at ganga í Madrid valkvøldið. Sambært blaðnum ætlaðu Jose María Aznar og konservativi flokkur hansara at gera sær dælt av hurlivasanum valkvøldið og støðuni aftan á ta blóðugu atsóknina.

# Clinton vildi ikki bumba bin Laden

**Á heysti í 2000 fann eitt ómannað amerikanskt njósnaraflogfar Osama bin Laden í Afghanistan, men Bill Clinton, forseti, vildi ikki bumba. Hann vildi hava bin Laden tiknan á lívi**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ein dagin á heysti í 2000 tók eitt ómannað amerikanskt njósnaraflogfar nakrar myndir av venjingarleguni Tarnak hjá yvirgangsmonnum í Afghanistan. Myndirnar vóru týðiligar, og á einari stóð ein hávaksin maður í hvítum klæðum og tosaði við nakrar aðrar menn.

CIA var ikki í iva um, at tann hávaksni maðurin var Osama bin Laden, og fregnartænastan boðaði alt fyri eitt Bill Clinton, forseta frá, at nú høvdu amerikanararnir møguleikan at beina fyri yvirgangsleiðaranum við at bumba venjingarleguna.

Men Bill Clinton gav ongantíð boð um at bumba, tí hann vildi hava bin Laden tiknan á lívi, sigur ein CIA-kelda við sjónvarpið NBC, sum almannakunngjørdi myndirnar fyrrakvøldið. Amerikanararnir vóru longu tá farnir at leita eftir bin Laden, sum var settur í samband við yvirgangsatsóknirnar í Kenya og Tanzania í 1998 og atsóknina at World Trade Center í 1993. Hesi álopini kravdu 230 mannalív.

Ein fyrrverandi amerikanskur generalur, Gary Schroen, sigur við NBC, at amerikanararnir vóru ikki fyrireikaðir til at søkja at leguni í Tarnak, tá myndirnar avdúkaðu bin Laden. Hann váttar eisini, at ætlanin var at taka bin Laden á lívi.





*Á heysti í 2000 fekk Bill Clinton at vita, hvar bin Laden var staddur, men forsetin vildi ikki hava yvirgangsmann in tiknan á lívi*